
Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Oljuprísurin kann trýsta eigararnar til at selja Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

03.08.2015 - 09:54

Oljan.fo

Atlants Kolvetni, ella Atlantic Petroleum sum felagið er best kent sum uttanfyri landoddarnar, hevur havt tað tungt í seinastuni. At oljuprísurin fór at lækka munandi fyri einum ári síðani var bara við til at gera støðuna enn tyngri hjá føroysku fyritøkuni.

Á yvirlitinum niðanfyri, sum er at síggja á heimasíðuni hjá Oslo Børs, so hava fáir glottar verið hjá íleggjarunum í Atlantic Petroleum, síðani skrásetingina har í desember 2013. Longu í februar 2014 fór kursurin á Atlantic Petroleum at lækka, og hann er ongantíð komin uppá 140-150 norskar krónur aftur, sum hann var beint eftir skrásetingina á Oslo Børs í desember 2013. Seinasta skrásetta søla av partabrævinum í Oslo í farnu viku var 40,60 norskar krónur.

Tí eru boðini í morgun um at felagið umhugsar møguleikan at selja alla fyritøkuna ikki so óvæntaði. Hóast Atlantic Petroleum hevur fleiri áhugaverd loyvir, so hjálpir ikki í longdini um oljuprísurin ikki hækkar munandi. Tað eru fá fund sum loysa seg at byggja út tá oljuprísurin nærkast 50 dollarum fyri fatið.

Í boðunum til keypsskálan í morgun sigur fyritøkan at tey fyribils ikki hava fíggja virksemi fyri 2016 og árini aftaná, og at tey tí fara at umhugsa ysar møguleikar fyri at fáa hetta uppá pláss. Talan kann vera um at royna eina sokallaða emisjón fyri at fáa íleggjarar at leggja pengar í felagið, ella at ein økir um skuldina.

Tað er Pareto Securities sum er fíggjarligur ráðgevi hjá Atlantic Petroleum. Ætlanin er ikki at kunna almenningin um nakað fyrrennnevndin hevur góðtikið eina ætlan av einum ella øðrum slag.

LES EISINI: Kanna møguleikan at selja Atlants Kolvetni

